# Ljótir skúlar smitta børnini

**Ulf Nordlund er dirigentur hjá Klaksvíkar Hornorkestri, sum fer at hava konsert saman við næmingum úr Tónlistaskúlanum leygardagin klokkan tvey. Ulf heldur, at børnini verða sum teirra umhvørvið sær út**



*Ulf Nordlund er dirigentur hjá Klaksvíkar Hornorkestri, og hann er skelkaður av, hvussu vánaligum standi flestu fólkaskúlarnir í Føroyum eru í*
*Mynd: Jens K. Vang*

SAMRØÐA
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** – Tykkara skúlar síggja sum heild ræðuligir út, er eitt tað fyrsta Ulf Nordlund sigur, tá hann sessast við borðið. Hann er púra ovfarin, at skúlarnir eru í so vánaligum standi. Og hann sigur, at tað er sanniliga ikki bara í Klaksvík. Hann hevur verið fleiri staðir runt í landinum og undirvíst í tónleiki, og hann heldur, at í teimum allarflestu støðunum er tað sera týðuligt, at nærum onki hevur verið gjørt við skúlarnar seinastu mongu árini.

– Tað er ein katastrofa fyri framtíðina hjá føroyingum, at skúlarnir síggja soleiðis út, og at onki verður gjørt fyri at menna teir, sigur Ulf.

Hann sigur, at tað er onki at ivast í at tað er lætt hjá føroyingum at fáa eyga á gullið, sum er í høvunum, men hann heldur, at vit duga ikki at síggja gullið sum er á landi. Nevniliga børnini.

– Tey verða forsømd við teimum skúlunum, sum tit hava í dag, heldur Ulf Nordlund. Og hann spyr samstundis hvørji fólk yvirhøvur – tað veri seg landsins myndugleikar ella kommunupolitikkarar – høvdu funnið seg í at verðið sett til arbeiðis á einum staði, sum sær so illa út og hevur ligið á láni í so mong ár.

Ulf Nordlund tosar eisini um, at mong vaksin eru ill um, at tey ungu dálka so illa, men tað heldur hann onki er at siga til.

– Hygg at skúlunum, sigur hann.

Serliga harmast hann eisini um, at tað letur til at tónleikurin ikki fær nakað pláss í fólkaskúlunum í dag.

– Børnini í skúlunum í dag syngja so at siga ikki, og tey fáast sum heild lítið við tónleik yvirhøvur.

Ulf sigur samstundis, at tað nyttar onki at leggja eftir lærarunum í hesum førinum, tí tað er sanniliga ikki teirra skuld, at støðan er, sum hon er í dag.

– Tað er ikki uppgávan hjá einum lærara at syrgja fyri, at fysisku karmarnir eru í lagi. Tað má vera upp til myndugleikarnar og politikararnar.

## Børn skulu gera tað teimum dámar

Ulf hevur í mong ár fingist við at arbeiða við børnum innan tónleikin. Hann hevur í dag tilsamans 36 næmingar undir sær í Klaksvíkar Tónlistaskúla. Og hann hevur nú tikið stig til at næmingarnir fara at hava konsert saman við Klaksvíkar Hornorkestri í Ósáskúlanum leygardagin. Børnini fara at spæla saman við sjálvum hornorkestrinum. Millum annað verður ein kanon á skránni við Dovni Jákup.

Ulf leggur seg eftir at finna løg, sum børnini kunnu fyrihalda seg til. Tað vil siga, at tað skulu vera løg, sum tey kenna og harvið hava tey tað stuttligari, meðan tey spæla.

Hann vísir eisini á, at tað samstundis verður lættari hjá barninum at fáa foreldur ella systkin at fyrihalda seg til teirra ítriv við, at tey eisini kenna løgini aftur.

Tá prátið fellur inn á annan tónleik, til dømis Prix Føroyar, tá heldur Ulf ikki, at tað hjálpir so nógv upp á børnini.

– Alt gott um Prix Føroyar, men tað fær ikki børnini at spæla meiri tónleik, heldur hann.

Ulf hevur skrivað eina bók, sum eitur Orkesterskolen, har hann nágreiniliga greiðir frá, hvussu arbeiðast kann við at fáa børn at spæla upp á instrumentir. Hann hevur eina tónleikatest, sum hann fer kring skúlarnar við og út frá henni verður staðfest, hvørji børn eru egnað til at spæla upp á ljóðføri. Hann greiðir frá, at tað er av alstórum týdningi at børnini sleppa at gera tað, sum teimum dámar.

– Tað nyttar lítið at trýsta eitt barn til at gera ella spæla okkurt, sum tað ikki dámar. Tí ræður um at finna útav, hvat ljóðføri tí dámar best, og hvat hóskar best til barnið, sigur Ulf, sum er útlærdur trompetistur, men kortini fæst mest við at spæla upp á valdhorn.

Við at taka næmingar í Tónlistaskúlanum við í eina tílíka konsert, heldur Ulf, at tað er eitt stuttligt upplivilsi hjá næmingunum at sleppa at sita og spæla saman við teimum eldru í hornorkestrinum.

Tað verða tó ikki bara næmingar hjá Ulf, sum verða við á konsertini. Eisini næmingar hjá Høgna Klakstein, sum lærir tey at spæla upp á ymisk slagljóðføri.

Á konsertini leygardagin verða solistar: Magnus Mikkelsen á trombone og Rani Hansen á euphonium. Tað gevur konsertini eina vissa breidd afturat børnunum.

Konsertin byrjar klokkan tvey.



*Eilif, Sámal og Julius eru tríggir næmingar hjá Ulf, sum skulu spæla við leygardagin*
*Mynd: Ulf Nordlund*



*Hesir næmingarnir eru allir byrjaðir í Tónlistaskúlanum innan fyri teir seinastu fýra mánaðirnar*
*Mynd: Ulf Nordlund*



# Rosalie hvørvur í mjørkanum



*Familjan Thomsen noyðist aftur til Danmark. Bæði tí tey vórðu skeivt kunnað av útlendingastýrinum, og tí tey seinnu lótu vera við at søkja um uppihaldsloyvi*
*Mynd: Jens K. Vang*

**Málið um filipinsku Rosalie Thomsen, sum er víst av landinum, er um at hvørja í einum mjørka av tagnarskylduni, sum allir partar goyma seg aftanfyri. Men tað tykist greitt, at hon noyðist av landinum, tí hon ikki søkti um uppihaldsloyvi, hóast hon upprunaliga varð skeivt kunnað av danska útlendingastýrinum**

ÚTVÍST
*Ingi Rasmussen*

Far av landinum innan 10. apríl. Annars kanst tú fáa hálvt árs fongsul.

Hørðu boðini til filipinsku mammuna at einum nýføðingi og einum seks ára gomlum dreingi, sum eru í Føroyum, standa við.

Tað gongur striltið at fáa viðmerkingar frá myndugleikunum um málið við Rosalie, sum er víst av landinum, tí hon ikki hevur uppihalds- og arbeiðsloyvi í Føroyum.

Rosalie Thomsen er gift Heina Thomsen, sum er føddur í Føroyum. Hon hevur filipinskt pass, men hevur varandi uppihaldsloyvi í Danmark, tí tey hava verið gift í átta ár. Tá tey fluttu til Føroya í september í fjør, varð henni upplýst, at hon kundi fara til Føroya uttan serligt visum. Men síðan er komið fram, at hon varð skeivt kunnað, tí danska útlendingastýrið, sum er myndugleiki á økinum, ikki helt, at hon ætlaði sær at flyta til Føroya við familjuni.

## Ivi um 14 dagar

Í skjølunum, sum liggja við málinum, verður sagt, at Rosalie Thomsen persónliga var á skrivstovuni hjá útlendingastýrinum 6. september 2002, har hon vísti sítt pass og varandi uppihaldsloyvi í Danmark. Hon upplýsti, at hon og maðurin skuldu til Føroya. Sambært útlendingastýrinum í 14 dagar. Stýrið upplýsti í hesum sambandi, at hon kundi fara til Føroya uttan føroyskt innferðarloyvi. Tað var skeivt viðgongur útlendingastýrið.

»Det var imidlertid ikke styrelsen bekendt, at du havde til hensigt at bosætte dig og eventuelt arbejde på Færøerne. Styrelsen har således ikke vejledt dig om, at en opholds- og arbejdstilladelse ikke var fornøden«.

Í hesum stendur orð ímóti orði. Rosalie Thomsen og maður hennara Heini Thomsen siga tað eisini vera skeivt, at hon upplýsti, at hon bert skuldi til Føroya í 14 dagar.

Av tí, at føroyska løgreglan seinni kemur fram til, at hon onki uppihaldsloyvi hevur, verður hon víst av landinum stutt eftir, at hon hevur átt eina dóttir.

## Fekk kjansin

Tað kann tykjast eitt sindur harðrent, at vísa Rosalie av landinum. Serliga tí hon hevur mann av føroyskari ætt, júst hevur átt eina dóttir, og tí at 6 ára gamli sonur teirra eisini er í Føroyum.

Hevði tað ikki verið gjørligt at givið teimum møguleika fyri uppihaldsloyvi, hóast tíðarfreistir, fastar mannagongdir og annað er brotið, ætlaði Sosialurin at spyrja.

Danska útlendingastýrið hevur enn ikki viljað gjørt viðmerkingar, tí talan er um eitt ítøkiligt mál, sum er fevnt av tagnarskylduni.

Í Føroyum hevur Linda Hesselberg, fulltrúi á Fútaskrivstovuni, havt málið um hendi, og hon vísir eisini til tagnarskylduna. Hon vísir í somu vending á, at politiið í Føroyum er at samanbera við »eitt víðkað postkontór«, ið bara hevur at fylgja teimum avgerðum, sum danska útlendingastýrið tekur.

– Vit hava viðgjørt málið eftir bókini. Eg kann bara siga, at tað varð gjørt Heina Thomsen (maður Rosalie Thomsen, blðm.) ógvuliga greitt, at kona hansara hevði ikki lógligt uppihald í Føroyum. Og so skjótt, vit vistu, at hon var her ólógliga, fekk hann tað púra greitt at vita, og eina freist, so tey kundu søkja um uppihaldsloyvi. Men tá ongin umsókn verður givin, noyðast vit sum almennur myndugleiki í útlendingamálum at gera, sum vit vera biðin og vísa tey av landinum, sigur Linda Hesselberg.

Sostatt er ongin vón. Familijan Thomsen noyðist úr føroyska mjørkanum aftur til asfaltið í Keypmannahavn, hóast tey ætlaðu, at børnini skuldu vaksa upp í Føroyum.

# Løgtingið mótmælir álopi

IRAK-KREPPA
*Ingi Rasmussen*

Alt bendir á, at USA loypir á Irak í hesum samdøgrinum. ST hevur ikki viljað stuðlað álophuginum hjá USA, og tað hevur ført til ósemju kring allan heim. Eisini í Føroyum. Seinnapartin í gjár veik løgtingið frá tíðarfreistini, so Uttanlandsnevndin kundi leggja uppskot til samtyktar aftur fyri løgtingið innan evstamark fyri álopi á Irak.

Sambandsflokkurin, Javnaðarflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og Tjóðveldisflokkurin vilja hava Føroya løgting at staðfesta, at øll tiltøk til tess at fáa Irak og Saddam Hussein at ganga undir ST-samtyktirnar um avvápna skulu góðkennast av ST. Samstundis heitir løgtingið á løgmann um at boða frá løgtingsins støðu.

Uttanlandsnevndin, har allir flokkar hava umboðan, hevur viðgjørt uppskotið. Og har gjørdi sama býti seg galdandi. Allir flokkar uttan Fólkaflokkurin og Miðflokkurin stuðla uppskotinum sæst í álitinum. Ein minniluti í nevndini, Jógvan við Keldu, Jógvan á Lakjuni og Jenis av Rana, mælir í sínum áliti frá at samtykkja uppskotið.

– Hvønn dag líða menniskju undir úrslitum av ótaldum vápnaðum stríðum. Tí eiga aðrar atgerðir, ið kunnu virka til frið, at stuðlast – eisini heima hjá okkum sjálvum. Minnilutin heldur ikki, at fyriliggjandi uppskot virkar til frið, men óttast fyri, at júst tað øvugta kann gerast úrslitið, siga Fólkafloksins og Miðfloksins umboð í Uttanlandsnevndini.

Sostatt fór løgtingið helst at samtykkja seinnapartin í gjár, at løgmaður skal boða altjóða samfelagnum frá, at føroyingar ikki stuðla einum álopi á Irak uttan við samtykki frá ST.

Hvagar hann skal venda sær, er enn ógreitt.